# PLANTUPAKKAR 2026

UMHVØRVISVIKAN
02.-09. mai 2026

## 1 DVØRGAFURA



Lágvaksin veturgrønur runnur/nálatræ.
Seinvaksandi.
Eingi serlig krøv til jørðildið, men veksur best í gloprutari jørð. Hetta slagið av Fjallafuru verður bert runnakent.
Vælegna til at fjala skráningar við.

*Pinus mugo var. pumilio*

## 2 ESKALLONIA



Hávaksin veturgrønur runnur. Rættiliga harðførur. Reydligar blómur, og angandi bløð. Trívst best í góðari, gloprutari jørð. Hóskar væl til lívdarál.
Natúrlig útbreiðsla: Kili.
Okkara tilfar: uppruni úr Orknoyggjum.

## 3 KLOKKURUNNUR 'BRISTOL RUBY'



Miðalhøgur til høgur leyvfellandi runnur. Heldur upprent og breiðvaksið vakstrarlag.
Skotini ljóst brún ella reyðbrún. Bløðini dimmgrøn.
Blómurnar myrkareyðar, stórvaksnar, í smáum tyssum.
Eingi ávís krøv til vakstrarlíkindini.

*Weigela 'Bristol Ruby'*

## 4 GRISELINIA



Hávaksin veturgrønur runnur. Bløðini gulgrøn.
Trívst best í moldríkari jørð. Tolir væl saltráma.
Hóskar væl til størri stakrunn, ella sum tilskorin girðing. Kann fáa skaða í nógvum vetrarkulda.
Úr Nýsælandi.

TÓRSHAVNAR KOMMUNA

Í faldaranum *Plantið eitt træ, í góðum grannalag* eru nakrar hentar leiðreglur, tá trø verða plantað og hildin viðlíka.
Faldarin sæst á torshavn.fo ella við at skanna QR-kotuna

Skanna meg

# PLANTUPAKKAR 2026

UMHVØRVISVIKAN
02.-09. mai 2026

## 5 PSEUDOPANAKS



Hávaksin veturgrønur runnur. Vanliga antin bert sum kall-ella kvennplanta. Blómurnar hava ein týðiligan hunangsanga, og plantusevjan er serliga kleimin.
Trívst best í góðari jørð og lívd. Tolir nakað av skugga. Runnurin hóskar eisini væl at hava í eini stórari krukku, t.d. í eini garðsstovu.
Úr Nýsælandi. Maori heitið er Whauwhaupaku.

## 6 SÓLCYPRESS



Lágvaksið, veturgrønt nálatræ, eisini nevnt 'Grønkálssypress'. Seinvaksandi. Hevur eingi serlig krøv til jørðildið, men tørvar góðan sólargang.
Uppruni, Japan

*Chamaecyparis obtusa 'Nana Gracilis'*

## 7 RÓSUMYRTA



Miðalhøgur veturgrønur ella hálvavegna veturgrønur runnur. Smáar, hvítar blómur.
Smávaksin, leðurkend bløð, brúngrøn á liti. Skal helst hava lívd fyri høgættini.
Natúrlig útbreiðsla: úr Tasmania.
Okkara tilfar: úr Tasmania

## 8 TASMANSK FJALLAMYNTA



Lágur veturgrønur runnur. Smá bløð, ið hava raman anga av myntu, verða tey kroyst. Ljósar blómur í klasum. Trívist best í góðari jørð og í góðum sólargangi.
Úr Tasmania.

TÓRSHAVNAR KOMMUNA

Í faldaranum *Plantið eitt træ, í góðum grannalag* eru nakrar hentar leiðreglur, tá trø verða plantað og hildin viðlíka.
Faldarin sæst á torshavn.fo ella við at skanna QR-kotuna

Skanna meg